# Føroysk gransking í altjóða hø

**Sosialurin hevur biðið Pál Weihe, yvirlækna á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu gera eitt úrtak úr fyrilestri um føroyska gransking**

VINNUSÍÐU-GREININGIN
*Pál Weihe*

*Í samtíð er ilt at meta um dygdina av gransking. Tað er eftirtíðin, sum ásannar møguligar dygdir. Her skal eg tó royna at lýsa nøgdina av almannakunngjørdari føroyskari gransking, og hvussu ofta føroysk gransking verður endurgivin í altjóða tíðarritum. Hetta er tó ikki á nakran hátt ein fullfíggjað uppgerð, men bert ábendingar. Eisini er at siga, at hugvísindi og samfelagsvísindi ikki koma til sín rætt í hesi uppgerð, tá leitað verður í dátugrunnum um altjóða tíðarrit, tí hesi meginøki vanliga ikki publicera á enskum mótsatt náttúruvísindi og læknavísindi, sum nærum altíð royna at publicera í altjóða enskmæltum tíðarritum.*



*Pál Weihe, sum hevur staðið á odda fyri mongum av kanningunum og granskingini, sum er gjørd seinastu árini*

Yvirskriftin í hesum fyrilestri kann týðast ymiskt. Hon kann t.d. merkja okkara samband og samstarv við altjóða granskaraheimin. Hetta er eitt týdningarmikið evni at umrøða, tí uttan samstarv við onnur á granskingarøkinum, hava vit ongar møguleikar í Føroyum. Tað skal tó ikki umrøðast her. Føroysk gransking í altjóða høpi kann eisini vera ein útgreining av, hvørjar møguleikar vit hava at granska á altjóða stigi í Føroyum, og hvørji krøvini eru, um vit skulu gera okkum galdandi, men heldur ikki tað skal umrøðast, sjálvt um hetta hevur alstóran týdning í tilrættaleggingini av føroyskari gransking.

Yvirskriftin kann eisini merkja ein samanbering av føroyskari gransking við altjóða gransking, t.v.s. at meta um nøgd og dygd og tað er evnið, eg fari at umrøða serliga. Ikki tí, eg eri ikki førur fyri at meta um dygdina hjá øðrum. Tað er soleiðis, at tá talan er um gransking, eru evnini mong, og tú skalt ikki hava arbeitt leingi í ávísum øki og vunnið tær kompetansu har, fyrr enn tú uppdagar, at tín kompetansa á øðrum økjum er lítil og eingin. Eg skal tí halda meg langt burtur frá at meta um dygdina hjá øðrum ella hjá mær sjálvum fyri tann skuld. Fyri at fáa eina hylling av hvar vit eru, havi eg leitað ymisk tøl fram úr almennum skráum bæði burturi og heima.

Fyrst um hugtakið gransking, sum er so nógv havt á mannamunni í hesum árum í Føroyum. Hvat merkir hetta. Eg síggi, at Granskingarráðið á heimasíðu síni hevur týtt definitiónina hjá OECD av gransking og menning og av innovatión. Vanliga greipa vit gransking og menning, og eitt sindur uttan fyri stendur nýskapanin ella innovatiónin, sum tey eisini rópa tað. Grundin til at OECD hevur sínar definitiónir er fyri at kunna gera upp, hvussu nógv virksemi er í teimum ymisku londunum. Teir hava brúk fyri at flokka og avmarka fyri at samanbera. Allýsingarnar hjá OECD eru hesar í týðingini hjá Granskingarráðnum:

Grundgransking er royniligt og ástøðiligt virksemi, ið fyrst og fremst verður int til at fáa nýggja vitan til vega um grundarlagið undir fyribrigdum og eygleiðingum uttan at hava serskild praktisk mál ella nýtslu fyri eyga.

Nýtt gransking ella "applied science" er virksemi við originalum burði til at finna nýggja vitan, ið fyrst og fremst er ætlað til praktisk endamál og nýtslur.

Menningararbeiði er skipað arbeiði, ið nýtir hendan kenda kunnleika, og miðar ímóti at framleiða nýtt tilfar, vørur og lutir at innføra nýggjar tilgongdir, skipanir ella tænastur ella bøta um tær, ið finnast.

Nýskapan er eitt hugtak, ið ofta er nýtt at virksemi í vinnulívinum, men tað kann nýtast á flestu samfelagsøkjum. Við nýskapan verður ofta hugsað um:

- at endurnýggja og víðka vøru- og tænastutilboð
- at fáa til vega nýggjar framleiðsluhættir, veitan og marknaðarføring og útbreiðslu
- endurnýggjan í leiðslu, skipan, arbeiðsviðurskiftum og førleika hjá starvsfólki.

Taki hesa greiningar fram, ikki tí at eg haldi tær eru so góðar, men fyri at lýsa, at granskingarvirksemi kann vera so mangt. Tað kann bæði vera grundgransking og so menningararbeiði ella møguliga eisini bert nýskapanararbeiði. Tað er av týdningi, at vit minnast til, at tað er hendan breiddin í hugtøkunum, soleiðis at pláss er fyri øllum, sum fáast við at framleiða nýggja vitan. Tað er soleiðis eingin grund at smæðast, bert tí ein ikki arbeiðir við grundgransking, sjálvt um tað sjálvandi er tað "fínasta", um eg so má siga.

## Mannagongdin

Innan nógvar vísindagreinir, harímillum læknavísindina, er tað soleiðis, at reglurnar fyri nær eitt arbeiði verður roknað fyri vísindaarbeiði, eru rættiliga greiðar. Tá ið arbeiðið er liðugt, verður tað skrivað í eini grein, sum verður sent til eitt vísindaligt tíðarrit. Blaðstjórin setir eina nevnd til at gera eina javnlíkameting, "peer-review". Tað merkir, at hann finnur vísindafólk, sum hava innlit í tað umráðið, sum skrivað verður um. Tað kunnu verða tveir ella tríggir serfrøðingar, sum meta um, og navnloyndir skulu teir so siga, hvat teir halda um arbeiðið. Teir kunnu koma við spurningum ella atfinningum, sum greinskrivarin skal svara. Hendan mannagongdin kann verða drúgv og taka fleiri mánaðir. At enda avger blaðstjórin, um greinin verður góðkend ella avvíst. Tá ið hon er góðkend til almannakunngering, kunnu vit siga, at hon er góðkend vísindi. Tað merkir sjálvandi ikki, at tað, sum sagt verður, er rætt, men tá hevur granskingararbeiðið fingið eina kritiska og kvalifiseraða meting.

Ein annar máti at meta um granskingarúrslit er at skriva eina doktararitgerð, sum verður mett um á almennum fundi, har javnlíkar, sum hava fingið góða tíð at lesa ritgerðina, siga sína hugsan um dygdina. Verður ritgerðin góðkend, standa hesir almennu góðskumetararnir inni fyri tí vísindaligu dygdini.

Granskingarúrslit, sum ikki eru javnlíkamett, kunnu sjálvandi vera góð vísindi, men innan náttúruvísindi verða tey vanliga ikki roknað við í uppgerðirnar yvir vísindalig avrik.

 Eg sigi frá hesari mannagongd til tess at gera greitt, at í vísindini ber tað ikki til



*Deildin fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu, Sigmundargøta 5, Tórshavn*